# Tjóðskaparligt og persónligt frælsi

Frælsið hjá tjóðini og hjá einstaklinginum hongur saman. Føroyar skulu vera ein sjálvstøðug tjóð, har rúm er fyri okkum øllum. Persónliga frælsið er ein av grundarsteinunum undir liberalistisku hugsjónini. Vit eiga at vísa frílyndi og tolsemi og stremba eftir at tryggja øllum í Føroyum tey rættindi, ið eru fevnd av altjóða sáttmálum. Hetta er besta fortreytin fyri menningini av einum nýmótans samfelag.

Á Løgtingi verða tað serliga hesi mál, sum eg fari at arbeiða fyri:

## BORGARLIGUR TJÓÐSKAPUR

Rákið í føroyskum og donskum politikki er við tjóðskaparmálinum. Komandi árini skulu vit yvirtaka øll málsøki, soleiðis at allur avgerðarrættur og øll ábyrgd verður her heima í Føroyum. Tá fær vinnulívið og einstaklingurin størst frælsi.

- Sjálvberandi búskap í seinasta lagi í 2015
- Ein fólkaatkvøða skal avgera okkara viðurskifti við Danmark
- Einskiljingartilgongdin í Føroyum má halda fram

## FØROYAR OG ALHEIMURIN

Ótrúligir møguleikar liggja í betri samskifti og samhandli við útheimin.

- Betri flogsamband við útheimin raðfestast fremst: Nýggjan altjóða flogvøll
- Eitt føroyskt uttanríkismálaráð við landsstýrismanni í uttanríkismálum og sendistovum kring heimin
- Okkara egna lið av diplomatum
- Handils- og samvinnusáttmálar við onnur lond um øll samfelagsøki
- Limaskapur í EFTA trároynast
- Føroyskar fyritøkur betri atgongd til altjóða marknaðin
- Útlendskar fyritøkur betri atgongd til føroyska marknaðin
- Opnan arbeiðsmarknað

## FRÆLSI OG FRÍLYNDI

Virðingin fyri tí einstaka hevur størsta týdningin í einum framkomnum samfelag.

- Størsti búskaparvøksturin, menningin og trivnaðurin eru í londum, har frælsið hjá tí einstaka og tolsemið er størst
- Altjóða mannarættindasáttmálar skulu fylgjast og tryggja øll í føroyska samfelagnum
- Frílyndi er fortreytin fyri einum framkomnum og nýskapandi vinnulívi
- Opinleiki er fortreyt fyri, at tey ungu og vælútbúnu koma heimaftur

Ein samgonga, sum hevur hesi málini í avtaluni fyri komandi valskeið, er mín samgonga.

Fólkaflokkurin eigur bestu stevnuskránna og bestu møguleikarnar at sameina eina sterka og málrættaða samgongu.

Gott val !

Poul Michelsen

www.poulmichelsen.fo



SENDISTOVAN